# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- John McCain var ein djarvur hermaður, men tað er ikki nóg mikið til at leiða land okkara*

*Joe Biden*

# So er Obama forsetavalevni

**Hillary Clinton steðhaði atkvøðugreiðsluni og bað fundarfólkið staðfesta Barrack Obama sum forsetavalevni**

Kappingin um at gerast valevni hjá demokratiska flokkinum á forsetavalinum í USA í heyst endaði formliga í nátt. Eftir skipanini skuldu teir meiri enn 4.000 valmenninir taka støðu til, um hvørt flokkurin skuldi stilla Barrack Obama ella Hillary Clinton upp. Tað var kortini greitt, at Obama hevði stuðul frá væl fleiri valmonnum, enn Hillary Clinton hevði, og tí var heldur eingin ivi um úrslitið.

Kortini bleiv atkvøtt, men tá tølini vístu, at umleið 1.500 valmenn høvdu atkvøtt fyri Barrack Obama og umleið 350 fyri Hillary Clinton, tók Hillary mikrofonina og bað fundin steðga atkvøðugreiðsluni og staðfesta Obama sum floksins forsetavalevni 2008. Nancy Pelosi, sum er forkvinna í Umboðsmannatinginum, tók orðið og spurdi, um fundarfólkið tók undir við tilmælinum frá Hillary Clinton. Svarið var eitt rungandi ja. Tá høvdu valmenninir úr Hillary-statunum New York, Kalifornia og Illinois ikki atkvøtt, og tað gjørdu teir heldur ikki.



*Hillary Clinton tók mikrofonina og steðgaði atkvøðugreiðsluni*

*Mynd: Polfoto*



*Joe Biden og Barrack Obama á pallinum í Denver tíðliga í morgun*

*Mynd: Polfoto*

Undan atkvøðugreiðsluni hevði Hillary Clinton givið sínum valmonnum loyvi til at atkvøða fyri tí valevni, sum teir vildu atkvøða fyri. Tann stóri spurningurin í nátt var, hvussu nógvir av hennara valmonnum fóru at atkvøða fyri henni, tí tað kundi geva eina mynd av, hvussu savnaður flokkurin stendur um Obama sum valevni. Fleiri av stuðlunum hjá Hillary Clinton høvdu sagt, at teir vildu sleppa at atkvøða fyri henni, og teir høvdu sett seg upp ímóti, at landsfundurin skuldi velja Obama uttan atkvøðugreiðslu.

## Leyp á McCain

Joe Biden, sum er varaforsetavalevni hjá Barrack Obama, hevði orðið á fundinum í Denver í nátt, og sum væntað nýtti hann høvi til at finnast at republikanska forsetavalevninum, John McCain.

- Eg havi ferðast kring heimin saman við John McCain. Okkara vinarlag er størri enn politikkurin, og eg eri framvegis ovfarin av hansara dirvi. Men eg kann als ikki góðtaka ta leið, sum hann ætlar at leiða land okkara. Hann ætlar at halda somu kós. Tann amerikanski dreymurin er um at fara fyri bakka. Eg veit tað, tit bita tað, men tað er ikki líkt til, at John McCain skilir tað, segði Joe Biden. Hann legði afturat, at tíðin krevur meiri enn ein góðan hermann, men eisini ein dugnaligan leiðara, og hann nevndi fleiri dømi um, hvar McCain hevur mistikið seg, og hvar Obama hevur havt rætt.

Næstu nátt skal Barrack Obama halda røðu á ítróttarvøllinum í Denver, og eygleiðarar vænta, at meiri enn 70.000 fólk koma at hyggja og lurta.

# Ódnin Gustav kann raka New Orleans

**- Vit bóna tað besta, men fyrireika okkum til tað versta, sigur guvernørurin í Louisiana**

Bobby Jindal, guvernørur í amerikanska statinum Louisiana, veit, hvussu stóran skaða tær tropisku ódnirnar kunnu gera, tí í New Orleans og aðrastaðni har um vegir eru framvegis mong minni um ódnina Katrinu, sum herjaði stór øki í Louisiana og grannastatunum síðst í august í 2005 og kravdi 1.800 mannalív.

Tí hevur guvernørurin sett statin í undantaksstøðu, nú tropiska ódnin Gustav er á veg uvir um Meksikanska Flógvan. Harafturat hevur hann givið fólki í New orleans boð um at fyrireika seg til at fara úr býnum, tí sambært veðurstovunum hevur Gustav kós ímóti býnum.

Higartil hevur Gustav kravt 23 mannalív á oyggjunum í Karibiska Havinum, og veðurfrøðingarnir siga, at Gustav kann gerast líka ring sum Katrina, tá hon kemur inn yvir amerikonsku suðurstrondina. Umleið 3.000 menn í amerikonsku tjóðarhirðini hava fingið boð um at standa til reiðar at hjálpa neyðstøddum.




## STUTT SAGT

### Mugabe gongur egna leið

Tað ljóðar, at forsetin í Zimbabwe, Robert Mugabe, ætlar sær at skipa eina nýggja stjórn uttan um andstøðuna, sum hevur meirilutan í tjóðartinginum. Í seinastuni hava tingingar verið millum stjórnarflokkin hjá Mugabe og andstøðuna, men sambært álítandi keldum tímir Mugabe ikki at bíða meiri eftir einum úrsliti og ætlar tí at skipa egna stjórn. BBC skrivar úr Johannesburg, at ger Mugabe álvara av ætlan síni, fer tað at fáa álvarssamar avleiðingar og kann millum annað gera enda á vápnahvíldaravtaluni, sum partarnir samdust um herfyri fyri at fáa enda á ófriðinum.

Tíðindastovurnar skrivar úr Zimbabwe, at myndugleikarnir gera seg framvegis inn á andstøðupolitikarar. Eitt nú vórðu tveir tingmenn hjá andstøðuni tiknir týsdagin. Mánadagin vórðu tveir aðrir tiknir, men teir vórðu kortini latnir leysir stutt eftir.

### Fleiri fátæk í Michigan

Sambært hagtølunum er fátækradømið minkað í øllum statunum í USA tey bæði seinastu árini uttan í statinum Michigan. Har vísa tølini, at 14 prosent av fólkinum liva undir tí alment setta fátækramarkinum, og tað er eitt hálvt prosentstig meiri enn í 2006, skrivar AP. Tað er eisini oman fyri landstalið, sum vísir, at smá13 prosent av amerikanska fólkinum liva niðan fyri fátækramarkið.

Tølini í Michigan vísa, at 6,5 prosent av fólkinum eru skrásett undir tí ið verður rópt "álvarsligt fátækradømi". Í hesum bólki eru hjún við tveimum børnum, sum hava minni enn 10.325 dollarar at liva fyri um árið, og hagtølini vísa, at tað eru serliga fólk í stórbýnum Detroit, sum eru í hesum bólkinum.

Meðalinntøkan í Michigan var 47.950 dollarar í fjør, og tað var heldur minni enn í 2006, tá meðallønin í statinum var 48.546 dollarar, skrivar AP úr Detroit.